norden






**Havnarkórið 40 ár**
**Leygardagin 4. feb. 2006 kl. 16.00**
40 árs jubileumskonsert hjá Havnarkórinum. Atgongumerki kr. 150,-



**Ung í Føroyum**
**Sunnudagin 5. mars kl. 17.00**
Stór almenn sýning við úrslitunum frá verksmiðjunum hjá Ung í Føroyum. Atgongumerki kr. 50,-



**Sebastian**
**Mikudagin 8. mars kl. 19.30**
Her hevur tú møguleika at uppliva ein tann besta trubadurin, ið danir hava havt ígjøgnum ár og dag. Einsamallur maður á pallinum við gittara og nøkrum sangum frá teimum seinastu 30 árunum. Atgongumerki kr. 150,-



**Føroya Symfoniorkestur**
**Sunnudagin 19. mars kl. 16.00**
Konsert við Føroya Symfoniorkestri. Atgongumerki kr. 150,-



**Suð & Vokalkompagniet**
**Týsdagin 11. apríl kl. 19.30**
Vokalkompagniet er eitt lívligt kór, ið syngur alt frá jazzi til gospel. Suð er eitt kent kór í Føroyum og høvdu útselt eftir stutta tíð til ABBA-konsertina í 2005. Hendan konsertin fekk nógv rósandi orð. Atgongumerki kr. 150,-



**Povl Dissing & Benny Andersen**
**Sunnudagin 23. apríl kl. 16.00**
Konsert við Povl Dissing og Benny Andersen, - tveir av best dámdu undirhaldarum á danska tónleikapallinum við einum ódeyðiligum repertoire av sangum og vísum. Atgongumerki kr. 150,-



**Mozarts Requiem**
**Sunnudagin 7. mai kl. 16.00**
Konsert við Føroya Symfoniorkestri. Atgongumerki kr. 200,-



**Monrad & Rislund**
**"Den rene jammer"**
**Leygardagin 20. mai kl. 19.30**
Monrad & Rislund framføra eina røð av sera stuttligum sangum og sketsjum. Monrad & Rislund eru kanska danska svarið uppá okkara Pipar&Salt. Stutt sagt eru teir „totalt langt úti!". Atgongumerki kr. 150,-



**Henrik Ibsens "Lille Eyolf"**
**Týsdagin 30. mai 2006**
Det Kgl. Teater við Rasmus Botoft, Helle Faralid, Peter Gilsfort, Benedikte Hansen og Helle Hertz. Atgongumerki kr. 150,-

**Fleiri upplýsingar fáast á www.nlh.fo ella við at ringja 317900**

NORDENS HUS PÅ FÆRØERNE
NORÐURLANDAHÚSIÐ

Norðari Ringvegur • 100 Tórshavn • Tlf. 317900 • Fax 319790 • www.nlh.fo

# SKRIVSTOVU-LÆRLINGUR

**Til ferðavinnufyritøkuna P/F Green Gate Incoming**

Vit sóknast eftir skrivstovulærlingi at byrja skjótast gjørligt. Vit bjóða eitt spennandi starv, har tú m.a. ert við til at selja og menna Føroyar sum ferðamannaland.

**Umsøkjarin skal:**
- hava lokið FHS ella HH prógv
- vera væl fyri í skandinaviskum og enskum
- vera vanur at arbeiða við teldu
- hava góð samstarvsevnir
- kunna arbeiða sjálvstøðugt

Lærutíðin er 3 ár, og starvið verður lønt sambært S&K sáttmála.

Umsókn við prógvum skulu sendast til:

Green Gate Incoming
Undir Bryggjubakka 3
FO-100 Tórshavn

Ella sendast við telduposti til info@greengate.fo
Umsóknirnar skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 13. februar

Green Gate Incoming varð stovnað í 2001. Endamál felagsins er at taka sær av áhugamálunum hjá ferðandi í Føroyum.

Hóast felagið er ungt, hevur starvsfólkið hollar royndir innan hetta økið frá øðrum ferðaskrivstovum.

Mál okkara er at allir gestir okkara skulu vera væl nøgdir og hava fingið eina upplivilsi fyri lívið, tá teir fara av landinum aftur.

Green Gate Incoming
THE FAROE ISLANDS DESTINATION COMPANY

Undir Bryggjubakka 3
FO-100 Tórshavn
Tel +298 350 520
Fax +298 350 521
info@greengate.fo
www.greengate.fo



# Lena í upptøkuhøli

Lena fór beint eftir nýggjárið í upptøkuhølið, sum vit í november skrivaðu, at hon fór. Lena var tá heldur still um, hvat ætlanin við upptøkunum var, men á heimasíðu síni sigur songkvinnan nú, at hon vónar, at upptøkurnar verða ein nýggj fløga.

Lena spælir nýggj løg, sum hon og Niclas hava skrivað fyri stuttum. Við sær í upptøkuhølið hava Lena og Niclas teir tríggjar Showmennirnar Kim, James og Jóhannus umframt Finnur Hansen og Jákup Zachariassen, samanumtikið er talan um ein sera sterka manning. Lena sigur við heimasíðuna, at hon er sera glað fyri hesi nýggju løg og fyri tað, ið hesir tónleikarar hava givið løgunum.

**nud**

www.sosialurin.fo Leyst starv á Sosialinum




# Marknaðarfólk

Ert tú fyrikomandi, dugir tú væl at selja, ert tú álítandi, røkin og dugur at arbeiða sjálvstøðugt, so ert tú júst tann vit leita eftir.

Til marknaðardeild okkara søkja vit eftir starvsfólki, sum kann vera virðvirkandi til framhaldandi at menna inntøkugrundarlag okkara.

Lýsingarinntøkur eru ein týðandi partur av tilverugrundarlagnum hjá føroysku bløðunum, og tí leita vit støðugt eftir nýggjum hættum at menna hendan partin av fyritøkuni. Tí er tørvur á fólkum, sum duga at fáa og ikki minst arbeiða víðari við góðum hugskotum.

Í samstarvi við starvsfelagarnar á marknaðardeildini verður tú við í dagligu framleiðsluni av bløðunum. Herundir tilrættislegging av lýsingarátøkum, temabløðum og lýsingartilboðum.

Løn verður ásett sambært avtalu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Gudny Langgaard á tlf. 341823. Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á gudny@sosialurin.fo

Starvið verður at seta skjótast gjørligt. Umsóknarfreistin er 17. februar, og skal umsóknin saman við viðkomandi skjølum sendast til:

**Sosialurin**
**Marknaðardeildin**
**Postsmoga 76**
**110 Tórshavn**

*Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blaði. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.*

# Eirindaleysur bilførari

Ein lesara okkara roynir – gjøgnum blaðið – at koma á tal við ein bilførara, sum koyrdi á hund hansara, »Tulle« mánanáttina.

– Til tín »bilførara« sum eirindarleyst koyrdi meg niður í J. C. Svabosgøtu mánanáttina 30. Januar, og lat meg liggja hjálparleysan á vegnum til løgreglan tók meg upp.

Nú eri eg deyÝur, tí tú gloymdi meg, men eg havi ikki gloymt teg,!

HUXA

BORGARLIGT BORÐHALD

Ársveitsla og aðalfundurin hjá Fólkafloksungdómi

Aðalfundurin hjá Fólkafloksungdómi, verður leygarkvøldið 25. februar 2006 kl. 19.00 á Hotel Føroyum.

Skrá sambært viðtøkum felagsins

Eftir fundin verður veitsla við døgurða, undirhaldi og tónleiki afturvið.

**Kostnaður fyri veitsluna er kr. 100,-**

Nýggjir limir kunnu tekna seg á tlf. 212491 ella 256762. Eisini ber til at tekna seg til huxa@huxa.fo

Allir HuXandi ungdómur er vælkomin!